


*Guðrið Hansdóttir gjørdist ársins songkvinna. Her handar Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, Planet-virðislønina*

# Guðrið fór allan vegin

**- Eg helt, at tað fór at vera Eivør, sum fór at vinna aftur í ár, segði ein ovfarin Guðrið Hansdóttir, sum varð vald til ársins songkvinnu**

Guðrið Hansdóttir var tilnevnd til tríggjar Planet virðislønir, og tað eydnaðist henni at vinna eina av teimum.

Tað var virðislønin sum Ársins songkvinna, og Guðrið var næstan kløkk av at fáa heiðurin, sum hon hevði roknað við, at Eivør skuldi vinna triðja árið á rað.

Men Guðrið hevur verið sera sjónlig í føroyskum tóinleiki farna ári. Hennara fyrsta útgáva hevur verið nógv spæld, og við nógvum framførslum hevur Guðrið av álvara vunnið fram á tónleikapallinum.

Í tilnevningini skrivaði Niels Uni Dam, at "Á Love Is Dead sleppa vit endiliga at uppliva góðu lagskrivingina og eyðkendu røddina hjá Guðrið Hansdóttir á fløgu.

Guðrið hevur á fløguni savnað ein bólk, ið gevur løgunum hjá henni júst tað skap, ið hon ímyndaði sær, at tey skuldu hava. Fløgan er í stóran mun borðin av góðu melodiiunum frálíku songrøddini og sorgblíðni. Hetta er beinrakin poppur, ið hevur vunnið hjørtuni á føroyingum. Á 15 teimum bestu hevur Guðrið gingið sína sigursgongd við fleiri løgum, og fløgan umboðar størsta gjøgnumbrot á føroyska tónleikapallinum í ár."

# Beinta fekk herða-klappið



*Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum, handar Beintu Gregersen, leiðara á Virkishúsinum í Klaksvík, serliga heiðurin, Ársins herðaklapp*

**Leiðarin í Virkishúsinum í Klaksvík, Beinta Gregersen, fekk serliga Planet-heiðurin 2007 fyri sítt arbeiði fyri at betra um umstøðurnar hjá tónleikarum í Klaksvík**

Tað var Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum, sum handaði Beintu Gregersen heiðurin. Planet-heiðurin er ein serligur heiður, sum verður latin av fyrireikarunum – altso ikki ein heiður, har fólk hava møguleika at sms'a inn og atkvøða.

Beinta Gregersen takkaði fyri heiðurin og segði, at hon sá fram til, at tey aftur næsta ár fáa eina Planet til Klaksvíkar.

- Men tað skal ikki verða til mín, legði hon dent á. Beinta segði víðari, at hon var fegin um, at Virkishúsið var nevnt, eins og umsitingin og Klaksvíkar Kommuna, tí uttan tey, hevði hetta als ikki borið til, segði hon.

Jan Müller segði í síni grundgeving fyri at lata Beintu virðislønina millum annað soleiðis:

"Í 80unum var Klaksvík ofta umrødd, sum tónleikahøvuðsstaður føroyinga. Men síðan hetta hava mest Eysturoyggin og Havnin kappast um hetta heitið. Gamaní, so er Føroya størsta tónleikatiltak á Vágsbø hvørt ár og fleiri stórir tónleikabólkar sóu dagsins ljós í 90unum í Klaksvík. Eisini í Studio Pegasus er nógvur tónleikur komin til føroyingar. Men sum kreativur orkudepil við nógvum spennandi nýggjum tónleiki, hevur Klaksvík ikki verið á fyrsta plássi seinnu árini.

Planet herðaklappið í ár fer til eina kvinnu, ið hevur slóðað fyri, at Klaksvík aftur gerst ein tílíkur kreativur orkudepil. Eg tosi sjálvandi um Beintu Gregersen, leiðara av Virkishúsinum og primus motor fyri Dávavirkið.

Dávavirkið er ein tann mest imponerandi verkætlanin, ið føroyskt tónleikalív hevur sæð. Í góðum samstarvi við Klaksvíkar kommunu hava Beinta og hini í Virkishúsinum fingið 8 tipp topp venjingarhøli, við útgerð, ið Beinta hevur fingið sponsorar at rinda.

At tørvurin á hesum hølum var átroðkandi vísir talið av bólkum, sum venja í Dávavirkinum. Líka síðan venjingarhølini lótu dyrnar upp hava umleið 25 bólkar vant her, og talan er um bæði ungar og royndar bólkar. Eisini er væntandi, at nógvir av hesum bólkum vera at síggja á pallum kring Føroyar komandi árini, og kanska onkur av teimum tekur eina Planet komandi ár, hvør veit."

# Arrini hjá L



**- Í kvøld dansa míni arr, segði Lena Anderssen, tá ið hon hevði vunnið ein Planet fyri ársins bestu tónleikaútgávu**

Let Your Scars Dance.

Soleiðis kallast besta tónleikaútgávan í Føroyum farna árið – sambært Planet tiltakinum.

Lena Anderssen er songkvinnan aftanfyri útgávuna, sum fekk heilt góð ummæli, tá ið hon kom út.

Lena Anderssen tók ímóti heiðrinum fyri best útgávuna.

- Men eg vil hava Niclas upp á pallin eisini, tí hann eigur eisini sín heiður av hesum, segði Lena Andersen, og maður hennara, Niclas Johannesen var skjótur at svara: Vit eru oytt! Og rætt er tað, tí sera dugnaligi lagasmiðjurin og tónleikarin eigur sín lut í verkinum hjá teirri sera dugnaligu songkvinnuni, Lenu Anderssen.

Um útgávuna Let Your Scars Dance skrivaði Niels Uni Dam í tilnevningini, at "tað hoyrist á Let Your Scars Dance, at Lena og Niclas eru ment á nærum øllum økjum. Nógvu konsertirnar og miðvísa arbeiða hjá fremstu føroysku tónleikahjúnunum hoyrist aftur á hesari frálíku útgávu, ið er nógv tað besta, ið nakar av teimum hevur latið úr hondum. Hetta er ein gjøgnumførd tónleikaframleiðsla: væl skrivað løg, fínir tekstir, væl sungið, væl spælt og oman á alt, so er tað eisini

# Sjarma, fjas ein rúgva av sjálvsáliti

**Sangarin í Boys in a Band ið vann heiðurin sum besti sangarin**



Pætur Zachariasen er oddamaður í bólkinum Boys In A Band, sum hava verið ársins tónleikanavn í Føroyum farna ári, og Pætur dugir eisini at standa á egnum beinum, tí hann vann Planet virðislønina sum ársins sangar í 2007.

Sjarma, fjas og ein rúgva av sjálvsáliti kann brúkast til nógv, men í førinum Pæturi Zachariassen goymir tað í ein ávísan mun, at hetta er ein sera góður sangari.

Boys In A Band oddamaðurin er egin og stuttligur, og kanska mest týdningarmikili brikkurin í putlispælinum, ið ger Boys In A Band til ein av Føroya bestu bólkum nakrantið, og sambært GBOB besta nýggja bólk í heiminum. Pætursa orkufulli sangur gevur ljóðmyndini hjá Boys In A Band nakað heilt serligt. Hann hevur eitt sera sterkt útrykk, og vinnur nógv hjørtu, tá hann letur munnin upp.